# Shell møguliga við aftur í føroyskari oljuleiting

**Eftir at hava mist áhugan fyri oljuleiting á føroyska landgrunninum fyri tveimum árum síðani, tykist oljurisin Shell nú av álvara at hava fiingið áhuga fyri Atlantsmótinum, sum eisini føroyska økið er partur av. Shell hevur saman við BP søkt um leitiloyvi í 19. bretska umfarinum**

OLJULEITING
*Jan Müller*

Tað er ikki útilokað, at eitt av heimsins størstu oljufeløgum, Shell, aftur er á veg inn í føroyska oljuleiting. Hesin oljurisin, sum í mong ár var við í forkanningunum av føroyska landgrunninum men sum fyri umleið tveimum árum síðani gjørdi av at taka seg úr ikki bert føroyska økinum men eisini mesta av virksemi sínum í bretskum øki vestan fyri Hetland, tykist nú aftur at hava sett ljóskastaran á Atlantsmótið, sum Føroyar eru partur av.

W. Hoogeveen, sum starvast á høvuðsskrivstovuni hjá Shell í Aberdeen vil hvørki vátta ella avsanna, at Shell hevur ítøkiligar ætlanir um at koma uppí aftur leitingina við Føroyar, men hann dylur ikki fyri, at nøgv er broytt tann rætta vegin, síðani Shell fyri tveimum árum síðani heilt tók seg úr Føroyaøkinum og lutvíst eisini úr bretska partinum av Atlantsmótinum. Tá lótu teir øðrum oljufeløgum sín part í Foinaven oljufeltinum fyri at fáa part í einum lisensi í Sakalin í Ruslandi ístaðin. Teir hava kortini framvegis part í Schiehallionfeltinum og onkrum lisensum nærhendis.

W. Hoogeveen váttar, at Shell og BP í felag hava søkt um teigar í 19. umfari í bretskum øki. Her er talan um teigar, sum liggja heilt uppat føroyska markinum. Hann vil ikki siga, hvat teir hava søkt um, men tað er sannlíkt, at økini liggja nær teimum teigunum, sum longu eru bodnir út á føroyska økinum. –Vit hava broytt støðutakan til Atlantsmótið, og hava tí eisini endurskoðað raðfestingarnar fyri leiting ymsa staðni í heiminum. Ting koma og fara, og nú hava vit valt at seta Atlantsmótið aftur á skránna sigur W. Hoogeveen, sum váttar, at teir eru meira bjartskygdir um Atlantsmótið í dag, enn teir vórðu fyri tveimum árum síðani.

– Tit vóru saman við BP í føroyska økinum. Nú hevur BP fingið ein lisens, sum teir meta er millum fimm bestu leitiøki hjá felagnum í øllum heiminum. Hava tit umhugsað at biðja um loyvi at sleppa uppí lisensin hjá BP?

– Hatta er ein hypotetiskur spurningur. Vit vóru ikki við í út bjóðingini í fjør, men vit útiloka ikki framtíðar luttøku um høvi býðst heldur ikki á føroyska landgrunninum.

– Er møguleiki fyri, at Shell verður partur av loyvinum hjá BP, áðrenn BP fer at bora í summar?

– Vit hyggja at øllum tí samlaða økinum í løtuni, og tí útiloka vit einki. W. Hoogeveen viðgongur, at Shell ynskir at vera við aftur á Atlantsmótinum og tá eisini á djúpum vatni. Hann sigur, at stórar broytingar eru hendar í sambandi við leiting á djúpum vatni,eitt nú er tøknin í dag nógv meira framkomin og kunnu teir tí eisini gera brúk av royndum síni frá Meksikanska flógvanum.

Eisini tann sannroynd, at infrastrukturin á Atlantsmótinum er við at broytast, metir Shell hava stóran týdning. Hoogeveen vísir á, at BP fer at leggja eina gassleiðing úr Foinaven og Schiehallion-feltunum til Sullom Voe í Hetlandi.

Tað er greitt, at fara Shell og BP at hava eydnuna við sær í tillutanini av loyvum á bretskum øki í næsta mánað, so kann hetta fáa positivar avleiðingar fyri leitingina við Føroyar. Keldur Sosialurin hevur tosað við siga, at eitt gott leitiloyvi til feløgini bæði hinumegin markið kann hava við sær, at Shell fer upp í leitiloyvi BP hevur við Føroyar. Hinvegin nýtist tað ikki at vera avgerandi fyri, um Shell aftur verður virkið á føroyaøkinum. Í samrøðu við Sosialin herfyri segði ein av ovastu stjórunum hjá BP Peter Osborne, at verður nógv olja funnin í økinum, er hugsandi, at skjøtil verður settur á samstarv í føroyskum og bretskum øki, um bæði infrastruktur og útbygging av feltum báðumegin markið.

Tað er eisini greitt, at fara fleiri stór og meðalstór oljufeløg at fáa góð leitiloyvi bretsku megin markið í næsta mánað, so kann tað skjótt smitta av uppá føroyska økið. Hugsast kann at hesi feløg tá eisini fara at vísa grannaøkinum ans. Tað kann so eisini henda, at tey finna olju í feltum, sum eisini liggja inni á føroyska økinum. Herfyri segði nýggi stjórin í bretska oljumálaráðnum Simon Toole við Sosialin, at millum tey umleið 20 feløgini, sum høvdu søkt í 19. rundu vóru eisini fleiri av teimum stóru altjóða oljufeløgunum. Og her er so Shell eitt teirra. Hini feløgini, sum hann sipar til, kunnu vera ExxonMobil, Texaco, Conoco og møguliga eisini TotalFina,Elf, øll feløg, sum hava verið við í forkanningunum við Føroyar men sum antin ikki fingu leitiloyvi ella av onkrari orsøk tóku seg úr økinum, áðrenn útbjóðingin varð latin upp. Úrslitið av 19. bretsku runduni kann gera, at fleiri av hesum feløgunum aftur fara at vísa Føroyaøkinum ans.

Tað hevur annars fleiri ferðir verið spurt, hvussu tað ber til, at BP ikki hevur viljað latið onnur oljufeløg sleppa við í teirra lisens við Føroyar. Fleiri feløg hava bankað á dyrnar, men hava fingið krakk. Tað er annars rættiliga óvanligt, at eitt felag einsamalt tekur allan váðan á seg í einum heilt nýggjum øki. Í hesum sambandi kundi verið spurt, um BP kanska alla tíðina hevur havt í bakhøvdinum, at Shell fór at koma aftur og taka sín part avváðanum. Við øðrum orðum: BP hevur latið pláss standa opið fyri Shell. Ein annar spurningur er so, hvørjar avtalur BP og Shell hava fyri 19. rundu í bretskum øki og hvussu hesar kunnu hava ávirkan á føroyska økið og virksemið her.




*Blái liturin eru allir blokkarnir, sum bretar hava bjóðað út. Her eru so eisini økini sunnan fyri verandi føroysku útbjóðing, øki, sum bretar fasthildu um fyri at gera avtalu við føroyingar um markið. Tað eru økini beint sunnan fyri reyða teigin, sum danska Dong er við í. (Kortið er frá Dong)*




*Nú føroyingar hava sett hol á sína fyrstu útbjóðing royna bretar nú at fáa gongd á nógv seinkaðu 19. útbjóðingina, sum er nettupp í sama partinum av Atlantsmótinum, sum tann føroyska*

## Shell vælkomið aftur til Føroya

OLJULEITING
*Jan Müller*

– Shell skal vera vælkomið aftur til Føroya at leita eftir olju sigur Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum í eini viðmerking til tíðindini um, at Shell hevur søkt um teigar í 19. bretska leitingarumfarinum, heilt upp at føroyska markinum.

Eyðun Elttør sigur, at teir longu tá Shell tók seg úr Føroyaøkinum fyri umleið tveimum árum síðani, søgdu felagnum, at tað skuldi vera vælkomið aftur til Føroya seinni, um teir broyttu meining.

Eyðun Elttør sigur annars, at tað vóru kanska serligar orsøkir tá, sum gjørdu, at Shell tók seg úr Føroyaøkinum, eitt nú lágir oljuprísir og tann sannroynd, at teir tá heldur vildu gera íløgur aðrastaðni. Landsstýrismaðurin dugir heldur ikki at síggja nakran trupulleika, um so er at Shell ynskir at gerast partur av einum av loyvunum, sum longu eru latin, og um so er, at verandi loyvihavari ynskir hetta.

Landsstýrismaðurin í oljumálum bíðar annars í spenningi eftir úrslitinum av tí 19. bretska umfarinum. –Tað ljóðar, at oljufeløgini, sum hava søkt, fáa boð longu í apríl, og tess fleiri feløg eru við í komandi leiting á bretskum øki heilt upp at okkara marki, tess størri áhuga skuldi okkara øki eisini fingið fyri tey. Eyðun Elttør sipar við hesum til møguleikan fyri, at tað kunnu finnast oljuprospekt ella veruligar oljukeldur, sum liggja báðum megin markið. Fáa oljufeløg, sum fara at bora bretsku megin markið, fatur í einum oljufelti, sum eisini er inni á føroyska økinum, so vil tað sjálvsagt hava stóran áhuga fyri okkum eisini. Og øvugt.

– Eg meti tí 19. leitingarumfarið í bretskum øki at hava stóran týdning fyri komandi leiting á føroyska landgrunninum eisini og ikki minst fyri einum framtíðar samarbeiði á øllum Atlantsmótinum – tvørtur um mark sigur Eyðun Elttør, sum á ongan hátt dylur fyri, at hann sær stórar møguleikar fyri samstarvi á Atlantsmótinum í framtíðini. Hann sigur, at tað er í føroyskari interessu, at fleiri oljufeløg, eisini slík, sum ikki eru við í fyrsta leitingarumfari við Føroyar, sleppa framat at leita í bretska økinum. Tað kann so gera, at tey vera áhugað fyri at vera við í leiting føroysku megin eisini. Og tess fleiri feløg eru við í hesi leiting, tess størri er møguleikin fyri at finna olju.




*Vit síggja undirgrundina á Atlantsmótinum og er avmerkt, hvat bretar hava funnið olju.*




*Ein orsøk til at Shell nú aftur er áhugað fyri Atlantsmótinum eru ætlaninar at leggja rørleiðingar á havbotnin*

# Óvissa um BP-boring

**Tað verður helst ikki boripallurin Jack Bates, sum fer at bora fyri BP á føroyaøkinum í vetur. Hann skal brúkast til uppgávur hinumegin markið. Nú leitar BP eftir øðrum palli ella boriskipi. Statoil ætlar at seta borin í um mánaðarskitið juni-juli**

OLJULEITING/ ANALYSA
*Jan Müller*

Alt bendir á, at tað verður ikki ein av heimsins best útgjørdu boripallum, sum fer at bora fyri BP í føroyskum øki í summar. Hetta upplýsir Hjarnar Djurhuus, stjóri fyri BP í Føroyum. Ætlanin hevur annars alla tíðina verið, at Jack Bates skuldi bora fyri BP í juli ella august. Men nú sær út til, at hann skal brúkast til uppgávur rundan um Foinaven og Schiehallion oljufeltini beint hinumegin markið. Hjarnar Djurhuus sigur, at BP arbeiðir við at finna aðrar loysnir, men tað er ikki bara sum at siga tað, tí tað eru so fáir pallar, sum kunnu brúkast til at bora á so djúpum vatni. Sosialurin skilur, at BP eisini hevur hugt eftir spildurnýggja boriskipinum hjá Smedvig, West Navion. Tað var hetta skipið, sum boraði í Grønlandi í fjør. Nú er tað í Egyptalandi.

Tað hevur ikki borið til enn at fáa nakað svar uppá júst hví Jack Bates ikki skal bora við Føroyar í summar. Heldur ikki hava vit enn fingið nakað svar, um pallurin skal bora framleiðslubrunnar í sambandi við verandi oljufelt ella hann skal út at leita eftir nýggjum feltum.

Í hesum sambandi skal nevnast, at BP og Shell hava søkt um boriloyvi í bretska partinum av Hvíta økinum, og tá vit vita, at bretska orku- og ídnaðarmálastýrið helst sær nýggjar leitiboringar longu í summar, nú 19. rundan er vorðin so nógv útsett, ber eisini til at seta sær spurningin: um BP og Shell ætla at brúka Jack Bates til at bora í bretska partinum av Hvíta økinum í summar, fáa teir eitt gott loyvi. Hugsast kann, at feløgini bæði í umsóknini hava bundið seg til at bora í summar fáa tey eitt gott loyvi, og at tey tá bara hava Jack Bates boripallin til at taka. Hetta kann BP eisini gera uttan at bróta nakrar avtalur á føroyskum øki, í hvussu er ikki skrivaðar avtalur. BP hevur nevniliga ikki bundið seg til at bora við Føroyar í hesum árinum. Tað hevur bundið seg til at bora sínar tríggjar brunnar áðrenn 2003. Hinvegin hevur BP alla tíðina latið føroyskar myndugleikar og vinnulív vita, at tað fór at bora tveir ella í minsta lagi ein brunn í ár.

Tað kann so eisini hugsast, at BP skal brúka pallin til framleiðslubrunnar nærhendis Foinaven ella Schiehallion.

Sosialurin skilur, at DTI, sum er bretski myndugleikin, ið letur loyvini, hevur í umbúnað at lata loyvini longu tíðliga í apríl, soleiðis at feløg kunnu fara at bora í summar. Tað hevur við øðrum orðum skund fyri bretskar myndugleikar, at feløg byrja at bora í nýggju økjunum við føroyska markið. Og tá vit vita, at BP og Shell hava sent inn umsókn saman um í hvussu er eitt øki, sum tey meta sum sera lovandi, tá kann hugsast, at tey í hvussu er fyribils "droppa" føroyaøkið til fyrimunar fyri at fáa eitt gott leitiloyvi bretsku megin markið.



Jack Bates boripallurin kemur helst ikki til Føroyar á hesum sinni. BP skal brúka hann til aðrar uppgávur í brestkum øki, tó ikki langt frá markinum



Boriskipið West Navion, sum kann gerast ein møgulekiki hjá BP. Og verður tað loysnin, so verður neyvan so nógv brúk fyri vørum og tænastum úr landi sum var talan um ein pall

### Statoil-boring

Síðani er tað Statoil-bólkurin. Har er tíðarætlanin tann, at boripallurin Sovereign Explorer, sum er á veg úr Afrika til Suðuronglands í dokk skal víðari til Írlands í næsta mánað. Ætlanin er so, at hann skal vera í føroyskum sjógvi um mánaðarskiftið juni-juli og beinanvegin fara undir at bora. Á ráðstevnuni, sum varð hildin í Aberdeen herfyri, boðaði Statoil frá, at teir hava flutt boristaðið longur norður og vestur eftir til prospektið "Longan". Hetta prospektið (tvs. møguliga oljufeltið) liggur nógv djúpri enn Pegasus-prospektið fyri sunnan. Tað ger, at tað tekur væl longri tíð ella 78 dagar at bora. Hetta merkir so aftur, at Amerada Hess-bólkurin, sum skal brúka sama pallin, fær hann ikki fyrr enn miðjan ella neyvan fyrr enn seinnapartin av september. Tvs. at teir skulu bora í oktober og november eisini. Hetta kunnu vera óveðursmánaðir, og tað kann gera boringina dýrari.

Samanumtikið kann tí sigast, at meðan tað fyrr hevur sæð rættiliga bjart út við kanska upp til 4 boringum í ár, so kann hetta í ringasta føri enda við bert eini boring, tí hjá Statoilsamtakinum. Tvs. at fær BP ongan pall ella skip til at bora ístaðin fyri Jack Bates í summar, so verða tær báðar ætlaðu boringarnar útsettar til í næsta ár. Og vil illa til hjá Statoil, at boringin verður at draga út, sum ikki er óvanligt, so er ivasamt, um Hess-samtakið dittar sær undir eina boring á hávetri.

Tað er greitt, at hetta fer uttan iva at koma teimum virkjum og fyritøkum á landi, sum eru við at gera seg út til fleiri boringar í summar, illa við. Sosialurin skilur, at hetta eisini kemur óvart á oljumyndugleikarnar í Føroyum. Komandi dagarnir ella vikurnar fara at siga okkum, hvørjar gitingar og metingar eru rættar – um vit fara at fáa tær ætlaðu 4 boringarnar ella um talið tá avtornar bert verður 1 til 2 boringar. Enn ber ikki til at siga nakað við vissu, hvønn veg hetta ber.

# Stór umhvørvisráðstevna undan leiting

OLJA OG UMHVØRVI
*Jan Müller*

Týsdagin og mikudagin verður skipað fyri ráðstevnu á Hotel Føroyum um olju og umhvørvi. Tað er GEM-samtakið, ið stendur fyri einum seminari, har greitt verður frá teimum úrslitum, sum tær ymsu verkætlaninar undir GEM (sum er eitt samstarv millum oljufeløg og føroyskar myndugleikar um eitt nú umhvørvisárin í sambandi við oljuvinnu) hava givið. Úrslitini eru fingin til vega í sambandi við fyrireikingarnar til fyrstu royndarboringarnar í føroyskum sjógvi seinni í summar.

Verkætlaninar verða lagdar fram at teimum persónum, sum hava verið við til at leggja arbeiðið til rættis í arbeiðsbólkunum undir GEM. Umframt framløgur verða eisini møguleikar at seta spurningar. Týskvøldið er so ætlanin at skipa fyri eini framløgu av verkætlanunum fyri almenninginum.

Millum teir, ið skulu leggja fram, eru fleiri føroyingar. Eitt nú Hjalti í Jákupstovu, Jan Sørensen og Bogi Hansen. Tað verður Eyðun Elttør, landsstýrismaður, sum setir ráðstevnuna týsmorgunin klokkan 9.15. Eftir tað fer Herálvur Joensen, stjóri í Oljumálastýrinum at hava orðið. Og síðani gongur tað slag í slag við fyrilestrum, sum fyri tað mesta útlendingar halda. Eisini eitt annað kent andlit frá fyrireikingunum til oljuleiting er við. Tað er Árni Olafsson.

Heitið á ráðstevnuni er "Understanding the faroese environment – preparations for Exploration Drilling", tvs. at skilja føroyska umhvørvið og fyrireiking til leitiboring. Oddamaðurin fyri tiltakið er Halvor Snarvold, sum eisini fer at greiða frá yvirgongdini frá GEM til nýggja áhugafelagið hjá oljufeløgunum FOIB.



*Tá Eyðun Elttør, landsstýrismaður vitjaði Alaska fyri meira enn tveimum árum síðani, varð eisini umhvørvi týðandi táttur. Her verður vitjað á eini støð, har tilfar frá boringini verður skilt og reinsað. Mynd Jan Múller*